**LØGMANSSKRIVSTOVAN**
Prime Minister's Office

# Trý aðalstjórastørv leys at søkja



Vit hava samanlagt 9 stjórnarráð í landsstýrinum. Til einstøku stjórnaráðini eru aðalstjórar settir. Vit leita nú eftir trimum dugnaligum og framskygdum aðalstjórum til ávíkavíst Løgmálaráðið, Umhvørvismálaráðið og Fiski- og samferðslumálaráðið.

## STARVIÐ SUM AÐALSTJÓRI

Aðalstjórin er fremsti fakligi ráðgevi hjá landsstýrisfólkinum. Aðalstjórin hevur somuleiðis ovastu ábyrgd av dagligari leiðslu, menning og rakstri í sínum stjórnarráði.

Aðalstjórin ráðgevur í fakligum spurningum og politiskum viðurskiftum í samband við, at mál hjá landsstýrinum skulu fremjast. Aðalstjórin skal tryggja landsstýrisfólkinum góða dagliga tænastu í øllum tiltøkum og spurningum, sum landsstýrisfólkið fær. Tað er somuleiðis ábyrgdin hjá aðalstjóranum at tryggja, at avgerðir eru lógligar og rættar. Aðalstjórin virkar sostatt sum mótvekt hjá landsstýrisfólkinum at tryggja haldgott grundarlag.

Við støði í leiklutinum hjá aðalstjóranum er týdningarmikið, at landsstýrisfólkið og aðalstjórin hava fult álit sínámillum. Tey eiga at hava eina felags fatan av leiðslurúminum hvør hjá øðrum soleiðis, at tey altíð vita hvør av øðrum í gerandisdegnum.

Aðalastjórin er ovasti stjóri hjá fyrisitingini og avvarðandi ráði. Tað merkir, at viðkomandi hevur ábyrgd av at tryggja eina vælvirkandi fyrisiting við støði í leiðslu og úrslitum. Við støði í lýsing av góðari ovastu leiðslu í almenna geiranum skal aðalstjórin:

- Menna eina organisatión, sum hevur fokus á úrslit og ávirkan
- Brúka sín rætt og sína skyldu at leiða organisatiónina
- Leiða arbeiðið í stjórnarráðnum og tryggja, at ráðið virkar í samsvari við politisku málini
- Hava eftirlit við stovnum undir stjórnarráðnum
- Sýna yrkisligan og persónligan integritet
- Verja legitimitetin hjá tí almenna og fólkaræðisligu virðini

## SETANARVIÐURSKIFTI

Aðalstjórastarvið er flokkað í 39. lønarflokki sambært sáttmála millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið, tó uttan at vera eitt tænastumannastarv. Starvið er áramálssett í 7 ár. Umframt eina mánaðarliga viðbót á 6.380 kr. fyri aðalstjóraleiklutin verður veitt ein mánaðarlig viðbót á 20% av grundlønini fyri áramálssetan. Eftirlønin er 15% av samlaðu lønini.

## LES MEIRA UM LEYSU STØRVINI

Um tú hevur áhuga í aðalstjórastørvunum, kanst tú lesa meira her:

**FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ** →
Ministry of Fisheries and Infrastructure

**UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ** →
Ministry of Environment

**LØGMÁLARÁÐIÐ** →
Ministry of Justice

## VILT TÚ HOYRA MEIRA?

Hevur tú spurningar ella ynskur tú at hoyra meira um aðalstjórastørvini, ert tú vælkomin at venda tær til John Rajani, løgmansstjóra, tel. 55 50 16.

### STUTT UM LANDSFYRISITINGINA

*Landsfyrisitingin er embætisverkið hjá landstýrinum. Hon fevnir um nýggju stjórnarráð og 140 starvsfólk. Í øllum stjórnarráðum verður dentur lagdur á at skapa eina fakliga sterka og dynamiska fyrisiting. Sum liður í hesum leggur fyrisitingin upp til møguleikan hjá embætisverkinum at skifta millum ráð og fáa ymiskar royndir úr allari fyrisitingini. Hesin møguleiki er somuleiðis galdandi fyri aðalstjórar.*

Tinganes · Postrúm 64 · FO-100 Tórshavn · +298 30 60 00 · lms@lms.fo · www.lms.fo

www.sansir.fo